# Beinagrind funnin í Hoyvíkstjørn

**Nú arbeiðið við at endurnýggja Hoyvíkstjørn er komið væl ávegis, hava arbeiðsmenninir funnið mangt og hvat í móruni. Eitt nú komu teir fyri kortum fram á nøkur bein**

HOYVÍKSTJØRN
*Lív Højsted Horsdal*
*horsdal@sosialurin.fo*

Menninir hugdu eina løtu eftir beinunum, hildu tey vera av seyði og tveittu beinini síðan aftur í mórudungan, ið var á veg niðan í Húsahagan við lastbilinum. Ein søga sigur annars, at ein maður skuldi verið dottin í Hoyvíkstjørn fyri um 100 árum síðani. Hesa søguna høvdu arbeiðsmenninir ikki hoyrt, tá teir funnu beinini. Men síðan beinini vórðu funnin, hava leysasøgur gingið sum heitt breyð um, at beinagrindin hjá horvna manninum nú er funnin. Men hvussu er og ikki, so halda arbeiðsmenninir framvegis fast við sítt um, at beinini vóru av seyði.

Higartil hevur løgreglan í Havn einki hoyrt um beinagrindina.



*Menninir, sum arbeiða í Hoyvíkstjørn, hava funnið mangt og hvat í móruni. Fyri kortum funnu teir nøkur bein.*



*Nú røkist tað endiliga fyri, at Hoyvíkstjørn verður liðug.*

## Hoyvíkstjørn liðug á ólavsøku

**Arbeiðið við at endurnýggja Hoyvíkstjørn gongur støðugt framá, og nú verður tjørnin endiliga liðug. Arbeiðsmenninir miða ímóti at verða lidnir á ólavsøku**

HOYVÍKSTJØRN
*Lív Højsted Horsdal*
*horsdal@sosialurin.fo*

– Vit hava grava alla móruna upp úr tjørnini og síðani fylt hana við haldgóðum tilfari – gróti og øðrum. Móruna hava vit við lastbili flutt niðan í Húsahagan, sigur Gullak Hansen, sum koyrir gravkúnna í Hoyvíkstjørn.

– Eftir ætlan verða vit lidnir á ólavsøku. Tá verða sílini slept niður aftur í tjørnina, dunnurnar koma aftur og børnini kunnu trygt spæla kring økið, sigur Gullak Hansen og leggur afturat, at áðrenn teir byrjaðu at tøma móruna úr tjørnini, var hon um tríggjar metrar djúp:

– Sera, sera hættisligt hjá øllum børnunum, sum dagliga hava sína gongd her. Eg tori ikki at hugsa um, hvat møguliga kundi hent onkran vetur, tá øll børnini skoyta á ísinum. Men nú vit hava lagt ein nýggjan botn á, verður tjørnin bara 50-60 sentimetrar djúp.

# Heimaftur sleppur tú ikki altíð

**Veður má sær ráða. Einki flogfar lendi á flogvøllinum í Vágum í gjár orsakað av mjørka, og í dag skulu heili 25 flogtúrar avgreiðast fyri at fáa flogferðsluna í rætt lag aftur.**

FLOGFERÐSLA
*Lív Højsted Horsdal*
*horsdal@sosialurin.fo*

Trý flogfør hjá Atlantic Airways fóru úr Vágum í gjár, og einki kom aftur. Samstundis sum flogfarið hjá Faroe Jet ongantíð kom til Føroya í gjár. Tískil standa fleiri hundrað fólk og bíða eftir at sleppa á flog á flogvøllinum í Vágum.

Flogførini hjá Atlantic hava í nátt verið í Íslandi og í Norra, meðan flogfarið hjá Faroe Jet hevur verið í Danmark:

– Sera nógv fólk standa og bíða á flogvøllinum, og tað fer í øllum førum at taka allan dagin at fáa flogferðsluna í rætt lag aftur. Um veðrið heldur sær, er ætlanin, at ferðslan skal koma í fasta legu aftur í morgin árini. Heili 23 flogtúrar skulu avgreiðast hjá okkum í dag, segði Birita á Løgmansbø, sum starvast hjá Atlantic Airways, tá vit fingu orðið á hana fyrrapartin.

Meðan Atlantic Airways hevur skund, sleppur Faroe Jet heldur lættari hesaferð:– Vit mistu bert tveir túrar í gjár. Í dag hava vit aftur tveir flogtúrar á skránni, men vit hava lagt teir báðar saman, so vit halda tíðirnar í dag, siga tey á skrivstovuni hjá Faroe Jet.

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur, sigur, at juli er tiltikin fyri mjørka:

– Eina ferð bíðaði eg heili 14 dagar í Danmark, áðrenn flogfarið megnaði at lenda fyri mjørka. Nú ferðist eg altíð bara við skipi, sigur Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur.



*Soleiðis sá flogvøllurin út á vevkameranum tíðliga í morgun, men klokkan 9.30 klárnaði tað brádliga í. Eftir ætlan skulu heili 25 flogtúrar avgreiðast á flogvøllinum í Vágum í dag*